# ST hevur svarað landsstýrinum

*Um ST skal gerast eygleiðari í fullveldissamráðingunum, er treytin tann, at eitt limaland hjá ST leggur málið fyri ein av stovnunum, sum síðani skal taka undir við tí*

Eyðun Klakstein

Um Sameindu Tjóða skal verða eygleiðari í samráðingunum millum donsku stjórnina og føroyska landsstýrið, skulu boð koma um hetta frá einum av stovnunum hjá ST.

Soleiðis svarar undiraðalskrivarin í lógarmálum, Hans Corell, fyrispurninginum frá uttanlandsdeildini hjá Løgmansskrivstovuni um mannagongdir, tá ST skal upp í altjóða samráðingar sum triðjipartur.

Og treytin fyri, at ein av stovnunum - til dømis aðalfundurin ella trygdarráðið - kann viðgera eitt slíkt mál er, at eitt av limalondunum hjá ST tekur málið upp.

- Hetta vísir, at ST í prinsippinum væl kann verða triðjipartur í samráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnini. Treytin er bara, at eitt limaland tekur málið upp í einum av stovnunum. Tað eri eg vælnøgdur við at fáa staðfest, sigur Høgni Hoydal, varaløgmaður.



*Høgni Hoydal, varaløgmaður, er nøgdur við svarið frá ST.*

**Mynd: Eyðun Klakstein**

- Hetta broytir einki. Landsstýrið hevur fingið tað svarið, sum roknast kundi við, og nú eigur tað at gloyma alt um ST. So mugu vit eisini vóna, at fólk sum heild gloyma hetta, tí áheitanin á ST setir Føroyar í ringt ljós, sigur Edmund Joensen, formaður í Sambandsflokkinum

### Misnøgdur uttanríkisráðharri

Nógv umtalað brævið varð sent ST 26. juli. Leiðarin av uttanlandsdeildini á løgmansskrivstovuni, Herluf Sigvaldsson, undirskrivaði brævið, sum var ein fyrispurningur um, hvussu mannagongdin er, tá ST ella stovnar undir Sameindu Tjóða eru triðjipartur í samráðingum.

Í skrivinum varð víst á, at hóast meiriluti í føroyska løgtinginum tók undir við ætlanini hjá landsstýrinum, hevði Danmark ikki víst veruligan vilja til at gera ein ríkisrættarligan sáttmála við Føroyar.

Og av hesi orsøk vildi landsstýrið hava at vita frá ST, hvør mannagongdin er, tá ST fer uppí samráðingar sum triðji partur.

Danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, var ikki fegin um brævið hjá landsstýrinum, og hann sendi 23. august bræv til løgmann, har hann gjørdi greitt, at landsstýrið hevði ongan myndugleika at venda sær til ST uttan við góðkenning frá donsku stjórnini.

Hetta hevði hann eisini givið boð um til donsku skrivstovuna á ST-høvuðsborgini um at føra fram yvirfyri felagsskapinum.

### Gott við formligum svari

Men hóast hetta svaraði ST brævinum frá landsstýrinum, og í brævinum verður staðfest, at Føroyar kunnu ikki heita á ST um at vera triðjipartur í fullveldissamráðingunum.

Tað skal gerast av einum av limalondunum hjá ST, og so skal málið viðgerast og viðmælast í einum av stovnunum hjá ST - til dømis á aðalfundinum ella í trygdarráðnum.

Men hóast vegurin til at fáa ST upp í fullveldissamráðingarnar er langur, er varaløgmaður nøgdur við svarið.

- ST svarar formliga, hvussu felagsskapurin kann koma uppí altjóða samráðingar. Alt tosið um, at ST einki kann hava við samráðingarnar við danir at gera, og at ST verður lýst sum ein felagsskapur, sum bara er uppi í, tá tað er blóðugt stríð, er skeiv, og tað er gott, at vit hava fingið tað svart upp á hvítt, sigur Høgni Hoydal.

- Vit kundu hugsað okkum at fingið meira at vita um, hvussu veruliga mannagongdin er, men tað fáa vit ikki í hesum skrivi. Vit fara ikki at venda okkum aftur til ST fyri at fáa hetta at vita, tí hesa vitan kunnu vit fáa aðrastaðni.

### Flenna eftir føroyingum

Formaðurin í Sambandsflokkinum heldur, at svarið frá ST er júst tað, sum roknast kundi við frammanundan.

- Einki kemur óvart á meg í hesum svarinum. Serfrøðingar hava sagt, hvat vit kundu rokna við, og hetta hava vit eisini fingið, eigur Edmund Joensen.

- Tað var burturvið av landsstýrinum at taka hetta stigið, tí hetta forpestar sambandið við Danmark og ger okkum til grin í altjóða samanhangi. ST má næstan flenna í kíki eftir okkum, tá landsstýrið kemur við slíkum fyrispurningi.

Edmund Joensen heldur, at áheitanin á ST lækkar virðingina fyri føroyingum, og at landsstýrið ikki hevur fylgt formalia í málinum.

Høgni Hoydal, varaløgmaður, sigur, at landsstýrið fer ikki at gera meira við málið nú. Hann sigur, at landsstýrið hevur fingið tað svarið frá ST, sum tað vildi hava.

# Humoristiskt og kensluborið leikrit vann leikritakappingina

*Jóanes Nielsen skrivaði besta leikritið til leikritakappingina, sum Leikpallur Føroya hevði útskrivað. Dómsnevndin metti leikritið hjá Jóanesi at verða tað mest fullfíggjaða leikritið, sum var komið inn*

Rithøvundin Jóannes Nielsen gjørdist vinnarin av leikritakappingini, sum Leikpallur Føroya útskrivaði.

Mánadagin var avdúkað, hvør vinnarin av kappingini varð, og hetta var gjørt á samkommu í Hans Andreasar húsi í Havn.

Dómsnevndin helt, at arbeiðið, sum var lagt í tey 9 innsendu handritini var virðismikið, tí tað sigur eitt sindur um, hvat rørist í samfelagnum og hjá tí einstaka menniskjanum í hesi tíð.

Dómsnevndin segði, áðrenn avdúkað varð hvør vinnarin var, at tey 9 handritini innihildu góðar søgur - summar spennandi, aðrar skemtiligar ella syrgiligar. Og at talan var um heili 9 nýggj føroysk leikrit, helt dómsnevndin verða óhoyrt.

- Í okkara grannalondum hevði tað svarað til fleiri hundrað - ja, um túsund - nýggj leikrit. Kanska er tað soleiðis, at føroyingar altíð hava dugað at siga frá, og hava virðismett týdningin av eini góðari søgu, segði Vár B. Jacobsen, sum sat í dómsnevndini.

Dómsnevndin segði eisini, at føroysk leikrit eru nakað serligt, og dómsnevndin mælti til at øll 9 leikritini vórðu brúkt.

### Gott hugflog

Undan avdúkingini av vinnaranum, vórðu onkur brot spæld úr leikinum.

- Eitur nakað land veekend, varð spurt, og tað var eisini heitið á vinnandi leikritinum.

Dómsnevndin helt, at hetta leikritið var skrivað úr einum humoristiskum, kenslubornum og heilt sermerktum hugaheimi. Søgugongdin er spennandi, og persónslýsingarnar breiðar og djúpar, og hvør einstakur persónur hevur sín egna lív og hvør sína søgu. Á tann hátt verður leikurin víttfevnandi og fjølbroyttur.

- Tað myndandi hugflogið er serstakliga gott, humoristiskt og sermerkt. Fer víða uttan nakrantíð at missa fótafesti, helt Olaf Johannesen, sum var ein av limunum í dómsnevndini.

Hóast leikurin er føroyskur, helt dómsnevndin, at hann eins væl kundi verið spældur og skiltur í øðrum londum.

### Fegin vinnari

Kappingin var dulnevnd, og tí hevði dómsnevndin lisið og mett um handrit, sum tey ikki vistu, hvør hevði skrivað. Hetta helt Olaf Johannesen var ein lætti, tí so snúði tað seg bara um leikin og ikki um persónar.

Av tí at kappingin var dulnevnd, bar ikki til at boðsenda vinnaran til hátíðarløtuna mánadagin.

Og tá navnið varð togað úr brævbjálvanum, stóð Jóanes Nielsen svart upp á hvítt. Rithøvundin, sum millum annað hevur skrivað yrkingar og skaldsøgur, var vinnarin av leikritakappingini.

Hann varð boðsendur og kom løtu seinni á staðið.

Jóanes var fegin um at hava vunnið, men hann vildi ikki fara í holt við at greina sítt egna leikrit.

- Eg visti, at eg hevði skrivað eitt toluliga gott leikrit, so tað var sjálvandi ein møguleiki at vinna, segði Jóanes Nielsen.

### Góðar søgur

At 9 leikrit komu inn til kappingina, skuldi givið møguleikar fyri at fáa nýggjar, føroyskar leikir uppsettar, helt dómsnevndin.

- Onkur av leikritunum tykjast ikki verða heilt liðug, men tey innihalda góðar søgur, og at tað kann arbeiðast meira við teimum, er eisini positivt, helt Olaf Johannesen.

Tey, sum hava sent inn, verða nú spurd, um tey framhaldandi vilja vera dulnevnd. Um tey vilja tað, fáa tey sítt leikrit aftur. Um tey standa fram, verða leikritini send til sjónleikaráhugað, sum síðani hava møguleikan at fara í holt við at seta onkran av leikunum upp.



*Vinnarin av leikritakappingini hjá Leikpalli Føroya, Jóanes Nielsen. Dómsnevndin metti hansara leikrit at vera tað mest fullfíggjaða av teimum 9 leikritunum, sum komu inn.*

**Mynd: Jens Kristian Vang**



# Signar aftur reinsaður



*Signar á Brúnni heldur avgerðina hjá Tróndi Djurhuus at fara frá sum sjónvarpsstjóra vera mansliga*

*Fyrrverandi landsstýrismaðurin í kringvarpsmálum heldur uppsøgnina frá sjónvarpsstjóranum vera enn eitt prógv um, at tað ikki var hann, ið handlaði skeivt í málinum um Sjónvarpið*

John Johannessen

Tróndur Djurhuus hevur tikið fulla ábyrg av rakstrarhalli Sjónvarpsins í 1998 og 1999 og hevur tí sagt seg úr starvi.

Hetta heldur fyrrverandi landsstýrismaðurin í kringvarpsmálum, Signar á Brúnni, vera enn eitt prógv um, at tað ikki var hann, sum bar seg skeivt at í málinum um raksturin hjá Sjónvarpi Føroya.

Signar á Brúnni mátti fara frá orsakað av, at hevði játtað sjónvarpinum pening úr gjaldføri landskassans uttan heimild frá løgtinginum.

– Eg havi allatíðina vitað, at eg var ósekur. Og tað prógvaði niðurstøðan hjá kanningarstjóranum eisini. Tað sum hendi, tá eg mátti fara frá, var, at ávísir politikarar slaktaðu meg fyri at fáa egnan politiskan vinning, sigur Signar á Brúnni.

### Skilir sjónvarpsstjóran

Fyrrverandi landsstýrismaðurin við ábyrgdini fyri Sjónvarpinum sigur seg væl duga at skilja sjónvarpsstjóran, nú hann hevur sagt seg úr starvi.

– Tróndur Djurhuus hevur verið ein góður sjónvarpsstjóri, men kortini hevur hevur sjónvarpið havt rakstrarhall hesi bæði árini. Hesum veit eg, at Tróndur hevur verið keddur av, og tí haldi eg, at tað er mansligt av honum nú at taka avleiðingarnar, sigur Signar á Brúnni.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin heldur tó, at fyrrverandi sjónvarpsstjórin kann vísa á, at hóast hann hevur skula stýrt sjónvarpinum sum eina sjálvstøðuga fyritøku, hevur Sjónvarpið ikki havt loyvti til at havt kassakreditt eins og aðrar fyritøkur.

Hetta, heldur hann, kann hava verið ein trupulleiki fyri sjónvarpsstjóran.

### Vildi ikki siga honum upp

Tá Signar á Brúnni var landsstýrismaður í kringvarpsmálum og Sjónvarpið kom í kreppu, helt Signar á Brúnni ikki tað ikki vera rætt at siga sjónvarpsstjóranum upp.

Sjónvarpsstjórin var komin í eina trupla støðu, sum hann var sera harmur um. Og tá maður samstundis var ein góður sjónvarpsstjóri, helt Signar tað vera rættast heldur at loysa akuttu støðuna.

Hví Tróndur Djurhuus hevur valt at siga seg úr starvinum júst nú, vit veit Signar á Brúnni ikki at siga. Men Sosialurin hevur frá álítandi keldum fingið at vita, at Tróndur Djurhuus frá nýggja landsstýrismanninum, Tórbjøn Jacobsen, fekk valið ímillum sjálvur at siga seg úr starvinum ella at verða koyrdur úr starvinum.

Tað hevur kortini hvørki borið til at fáa hesi tíðindini váttað frá Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismanni í kringvarpsmálum, ella Tróndi Djurhuus.



## Tórbjørn um SvF 27. juli 2000:

– Sjónvarpið tykist liggja í andaleypi. Landsstýrismaðurin hevur síðani í fjør havt ábyrgdina, og tí er hetta eitt tað fyrsta málið, sum eg má fara undir. Sjónvarpið var orsøkin til, at fyrri landsstýrismaðurin fór úr starvinum, og eg veit, hvønn veg tað fer at bera, um vit ikki fáa loyst hetta málið.

– Eg ætli mær ikki at leggja skránna, men eg skal ikki dylja, at ofta undrist eg á hugburðin, sum kemur til sjóndar í tí, sum tey velja at senda. Fleiri hava hesa seinastu tíðina nevnt tað margháttliga í, at teir eitt sunnukvøld gjørdu nógv burturúr og ivaleyst brúktu dýrar yvirtímar til Watson, sum brúkar sína tíð til at niðurbróta føroyska mentan. Einki í tí sendingini boðaði frá, at tað var neyðugt við eykasending. Tað er so eitt. Men samstundis kendi sjónvarpið ikki ábyrgd fyri at vera til staðar, tá 1000 føroyingar sama vikuskifti vóru á Syðradali í sambandi við nýggja minnisvarðan, og tá fleiri hundrað vóru í Hattarvík í sambandi við nýggju altartalvuna.

– Eg haldi, at tað alla tíðina hevur eydnast útvarpinum at vera tjóðskaparligur mentunarberi. Sjónvarpið átti at havt serligar møguleikar í hesum, men tað tykist á allan hátt vera eitt býtisbarn. Tað mugu vit fáa eina loysn uppá, men eg kann ikki siga akkurát nú, hvat eg ætli at gera.

